# Føroyingar bjóða seg ikki fram sum vertir

**Føroyar hava ikki nóg góðar umstøður til at hava Oyggjaleikirnar, og tí verður eingin heilhjartað roynd gjørd at fáa leikirnar hendan vegin í næstum. Um tvey ár verða leikirnir í Hetlandi, og síðani stendur Rhodos væntandi fyri tørni**

VERTIR
*Eyðun Klakstein*


*Føroyingar hava ikki umstøðurnar at verða vertir fyri Oyggjaleikunum, og tí koma leikirnir neyvan hendan vegin í bræði*

Føroyar hava ikki allar tær neyðugu umstøðurnar til, at vit kunnu bjóða okkum fram sum vertir fyri komandi Oyggjaleikum.

Hetta halda bæði forsetin í ÍSF og ein av drúgvastu samskiparunum í oyggjaleikahøpi.

– Vit royndu fyri tveimum árum síðani at liggja fram við, men tá ið tað gjørdist greitt, at vit ikki høvdu umstøðurnar at hýsa leikunum, gjørdu vit ikki álvara av royndini. Hinvegin stuðlaðu vit hetlendingum í at fáa leikirnar, sigur Heðin Mortensen, forseti í ÍSF.

Sofus Johannesen, sum er ein av sentralu samskiparunum í føroyska oyggjaleikaarbeiðnum, er samdur við forsetanum í ÍSF.

– Vit kunnu ikki tosa seriøst um at fáa Oyggjaleikirnar aftur til Føroya, tá ið vit ikki hava møguleikan at hýsa øllum kappingunum, sigur Sofus Johannesen, sum situr í føroysku Oyggjaleikanevndini.

**Mangla tennisvøllir**

Oyggjaleikirnir vóru hildnir fyrstu ferð í 1985, og í 1989 komu teir til Føroya. Síðani hava leikirnir verið hildnir annaðhvørt ár, og teir eru støðugt vaksnir.

– Tá ið vit høvdu Oyggjaleikirnar búðu nógv ítróttarfólk á skúlum, men tað hevði als ikki borið til í dag. Nú er neyðugt við hotelli til øll, men vit hava ikki møguleikan at hýsa eini 2500 fólkum á hotelli í Føroyum. Tað er ein trupulleiki, men tað ber helst til at loysa hann við at eiga hotellskip, sum teir fara at gera í Hetlandi, sigur Sofus Johannesen.

Hann vísir eisini á, at umstøðurnar til frælsan ítrótt eru ikki av teimum bestu, men at tað ivaleyst ber til at halda tær kappingarnar í Føroyum.

– Men vit klára ikki at avgreiða eina tenniskapping, tí tveir tennisvøllir eru alt ov lítið. Tað er neyðugt við minst seks vøllum, um vit skulu hava eina tenniskapping, sigur hann.

**Stór uppgáva**

Heðin Mortensen ásannar, at føroyingar neyvan verða vertir fyri Oyggjaleikunum í næstum.

– Tað tykist sum, at Oyggjaleikirnir nú verða hildnir á oyggjum, har nógv ferðavinna er, tí har eru møguleikarnir fyri gisting góðir. Ítróttarfólkini lata seg ikki longur noyða við at búgva á skúlum, og tí mugu hotell brúkast til at hýsa teimum.

– IGA vil eisini hava, at Oyggjaleikirnir verða hildnir á so samlaðum umráði sum gjørligt, og tí er tað ein vansi, at vit ikki hava umstøður til frælsan ítrótt í Havn. Vit høvdu vónað, at rennibreyt fór at koma á Tórsvølli, men tað kom hon ikki, sigur Heðin Mortensen.

– Tað er ein sera stór uppgáva at skipa fyri Oyggjaleikunum, og tað kostar nógvar milliónir at hava teir. Og vit mugu ásanna, at sum støðan og umstøðurnar eru hjá okkum í dag, kunnu vit neyvan bjóða okkum fram sum vertir, sigur forsetin í ÍSF.

# Oyggjaleikirnir eru gull verdir

**Forsetin í Ítróttarsambandinum heldur, at flestu kappingarnar á Oyggjaleikunum passa væl til føroysk ítróttarfólk, og leikirnir eru góðir bæði hjá teimum, sum hava teir sum endaligt mál, og hjá teimum, sum royna at koma víðari til aðrar altjóða kappingar**

OYGGJALEIKIR
*Eyðun Klakstein*

## Heiðursmerki í 2001

Soleiðis var býti av heiðursmerkjum, tá ið Oyggjaleikirnir vóru á Isle of Man í 2001

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| 1. Jersey | 51 | 42 | 39 |
| 2. Isle of Man | 41 | 25 | 39 |
| 3. Gotland | 20 | 14 | 17 |
| 4. Guernsey | 18 | 38 | 25 |
| 5. Føroyar | 15 | 12 | 13 |
| 6. Áland | 11 | 13 | 5 |
| 7. Isle of Wight | 11 | 8 | 16 |
| 8. Cayman Islands | 10 | 8 | 11 |
| 9. Rhodos | 8 | 4 | 9 |
| 10. Saaremaa | 5 | 7 | 7 |
| 11. Hetland | 2 | 6 | 10 |
| 12. Ynys Môn | 2 | 5 | 2 |
| 13. Gibraltar | 0 | 3 | 10 |
| 14. Grønland | 0 | 3 | 1 |
| 15. Orkneyoyggjarnar | 0 | 2 | 2 |
| 16. Prince Edward Island | 0 | 0 | 1 |

Forsetin í Ítróttarsambandi Føroya, Heðin Mortensen, er ein av teimum mongu føroyingunum, sum vera á Guernsey komandi vikuna. Hann er ovasti leiðarin fyri føroyska ítrótt, og hann er sera fegin um møguleikarnar, sum Oyggjaleikirnir geva føroyskum ítróttarfólki.

– Flestu kappingarnar á oyggjaleikunum passa sera væl til føroyingar. Enn eru onkrar ítróttargreinar, har vit ikki eru komin upp á sama støðið sum aðrar oyggjar, men tað eru hinvegin eisini ítróttargreinar, har vit ganga á odda, sigur Heðin Mortensen.

– Oyggjaleikirnir eru góðir hjá ítróttafólkum, sum hava hesar leikir sum endaligt mál, og teir eru eisini góðir hjá teimum, sum vilja við í aðrar alheimskappingar. Á Oyggjaleikunum ber til at fáa royndir í millumtjóða kappingum á høgum støði, og slíkar kappingar styrkja okkara ítróttarfólk, heldur Heðin Mortensen.



*– Føroysk ítróttarfólk fáa nakrar góðar avbjóðingar á Oyggjaleikunum, og slíkir leikir eiga at verða ein liður í menningini av føroyskum ítrótti, sum miðjar ímóti at verða við í øðrum alheims kappingum, heldur Heðin Mortensen*

**Menning**

ÍSF-forsetin nevnir fótbólt, flogbólt og svimjing, sum dømi um ítróttargreinar, har føroyingar eru við heilt har frammi.

– Føroysk ítróttarfólk fáa nakrar góðar avbjóðingar á Oyggjaleikunum, og slíkir leikir eiga at verða ein liður í menningini av føroyskum ítrótti, sum miðjar ímóti at verða við í øðrum alheims kappingum, heldur Heðin Mortensen.

So at siga allar av føroysku ítróttargreinunum, sum eru við á Oyggjaleikunum, bjóða seg fram í kappingin um heiðursmerki, og yvirlitini yvir heiðursmerki seinastu árini vísa, at føroyingar eru við millum tey bestu á leikunum.

– Nú vóni eg, at fyrireikingarnar hjá føroysku ítróttarfólkunum fara at koma til góðar, og at vit fara at fáa eitt gott úrslit á Guernsey.



# Nógv heiðursmerki upp á spæl í fimleiki




*Føroyingar vunnu nógv heiðursmerki í fimleiki á seinastu Oyggjaleikunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Fimleikur

Helgi Winther Olsen
Høgni Øster
Eivind A. Hansen
Tórarin Holm Petersen
Gutti Harrysson
Poul Esper Hanusarsson
Sarita Heinesen
Anita Knudsen
Anna Hansen
Marjun Persson

**Landsliðsvenjarin í fimleiki hevur stórar vónir til menninar í bæði liðkappingini og einstaklingakappingini, og hann heldur, at kvinnurnar eisini hava møguleika at vinna okkurt heiðursmerki**

FIMLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Skal tað tosast um ein profil á føroyska landsliðnum í fimleiki, so er tað Helgi Winther Olsen, sum eisini gjørdi rættiliga vart við seg fyri tveimum árum síðani. Hann hevur vant fimleik í Danmark og er aftur hesaferð sera væl fyri, nú kappast skal á Oyggjaleikunum.

– Eg ivist onga løtu í, at Helgi fer rættiliga at markera seg á hesum Oyggjaleikunum, sigur Henrik Bjørn Bertelsen, landsliðsvenjari.

Hann heldur, at aðrir fimleikarar eisini fara at standa seg væl, men hann harmast um, at Marit Magnussen, sum hevur verið fremsti kvinnuligi fimleikarin, ikki kann vera við vegna skaða.

**Liðkapping**

Tríggjar ymiskar kappingar eru á Oyggjaleikunum.

Fyrst er tað liðkappingin, har kvinnur og menn kappast fyri seg á liðum.

Hjá monnum eru fýra á hvørjum liði, og úrslitini hjá trimum teimum bestu telja í uppgerðini.

Hjá kvinnum eru fimm á hvørjum liði, og har eru tað úrslitini hjá fýra teimum bestu, sum telja. Føroyska liðið er í tí støðu, at nú Marit Magnussen ikki fær verið við, eru bara fýra kvinnur á liðnum, og tí telja úrslitini hjá øllum við, hóast onkur skulu gjørt okkurt mistak.

Seinast hildu føroyingar, at teir vórðu snýttir fyri gullið í liðkappingini fyri menn, og tí fara teir at gera sítt ítarsta fyri at vinna hesa kapping á Guernsey.

**Einstaklingakapping**

Eftir liðkappingina verður kappast í ymiskum reiðsskapsfimleiki. Hjá monnum er talan um seks ymiskar reiðskapir og hjá kvinnum fýra.

– Her hava vit góðar møguleikar at vinna onkur heiðursmerki, og eg rokni serliga við, at menninir fara at gera vart við seg í hesum kappingum, heldur landsliðsvenjarin.

Hann vísir á, at Helgi Winther Olsen og Høgni Øster eru væl fyri at taka kappingina upp við hinar oyggjabúgvarnar.

**Frí kapping**

Seinasta fimleikakappingin á Oyggjaleikunum er ein frí kapping, har teir einstøku fimleikararnir tó skulu ígjøgnum onkur ávís øvilsi.

– Her er besti møguleikin hjá kvinnunum at vinna onkur heiðursmerki, heldur Henrik Bjørn Bertelsen.

– Men tað er trupult at siga, hvussu vit fara at standa okkum, tí vit vita ikki, hvussu fimleikararnir hjá hinum oyggjunum eru fyri nú. Tá ið vit hava sæð fimleikararnar kappast fyrsta dagin, eru vit blivin væl klókari, heldur hann.

Tað er tó lítið at ivast í, at fimleikurin fer at skaffa føroyingum onkur heiðursmerki á Guernsey.


*Landsliðsvenjarin í fimleiki roknar við, at serliga menninir hava møguleika at vinna heiðursmerki hesaferð, men kvinnurnar kunnu eisini spæla við í onkrum kappingum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*